# Kikhosti í Føroyum

**Vanliga eru farsóttir við kikhosta triðja til fimta hvørt ár.**

Kikhosti er ein sjúka í andaleiðini, elvd av eini bakteriu. Hon kemur fyri um allan heim í øllum aldursbólkum, men sæst vanligast hjá børnum og verður tí nevnd ein av barnasjúkunum.

Sjúkan smittar illa og spjaðist beinleiðis við dropaspjaðing frá sjúklingum, ið hosta. Hon smittar ringast fyrstu tíðina, áðrenn sjúklingurin er farin at hosta í kíki. Eftir at eyðkendu hosturíðirnar eru byrjaðar, minkar smittuvandin líðandi og er av 6 vikur eftir sjúkubyrjan. Eldri fólk, ið hava havt sjúkuna sum børn, kunnu væl fáa hana aftur, tó nógv linari og ofta bara við vanligum hosta. Tey kunnu tá bera smittuna inn á pinku- og smábørn. Hjá størri børnum og vaksnum, ið eru koppað fyri kikhosta, er sjúkan vanliga nógv linari enn annars.

Børn, ið koma fyri smittu kunnu gerast smittuberar uttan at vera sjúk. Eru tilburðir við kikhosta í einum dagstovni, eiga foreldur at komast eftir, at barn teirra kann vera frískur smittuberi, ið kann smitta ikki koppaði systkin í pinkubarnaaldri.

Royndir vísa, at pinkubørn ofta verða smittað heima av størri systkjum, og tí eiga fólk við krími ella hosta at verða hildin burtur frá ikki koppaðum pinkubørnum

Tíðin frá smittu til sjúkubyrjan er vanliga 7-14 dagar. Sjúkan byrjar oftast sum vanligt krím, og sum frálíður kemur meira turrur hosti. So líðandi koma tær eyðkendu hostaríðirnar, har ið sjúklingurin hostar í kíki. Uttan at anda inn, hostar barnið uppaftur og uppaftur í saman uttan at náa at anda inn, so at tað gerst bláreytt í andlitinum. Eftir hetta kemur ein kikkandi innanding, og seigt slím verður hostað upp. Eisini kann barnið spýggja. Hesi herðindi kunnu koma skjótt hvørjum øðrum á baki nógvar ferðir um samdøgrið, so at barnið gerst púra útlúgvað.

Børn undir ½ ára aldur, ið ikki orka at hosta í kíki, blána, missa andan og kunnu svíma.

Eftir 2-4 vikur minka eyðkendu hostaríðarnir líðandi, og sjúkan er oftast av eftir 6 til 8 vikum, men barnið kann framvegis hosta í eina tíð. Hjá ikki koppaðum pinku- og smábørnum kann sjúkan gerast sera álvarsom við svárum trupulleikum at anda, so at neyðugt er at leggja barnið inn á sjúkrahús.

Kemur kikhosti fyri í einum dagstovni, skulu børn undir eitt ár sendast heim, uttan so at tey hava havt kikhosta ella tey áður í minsta lagi hava fingið fyrstu tvær kikhostakoppingarnar. Børn og fólk annars, ið hava fingið staðfest kikhosta, eiga ikki at hava undir eitt ár, áðrenn tey við kikhosta hava fingið viðgerð við makrolidum í fimm dagar eftir avtalu við lækna. Smittuvandin er lítil eftir viðgerð í fimm dagar.

Børn við kikhosta, sum annars ikki tykjast sjúk, kunnu koma í dagstovn (uttan dagstovnar har pinkubørn eru) ella skúla í tí tíðarbili, har tað framvegis er ein ávísur smittuvandi. Børn mugu tó ikki koma á dagstovn ella í skúla, so leingi sum hostaríðurnar tarna andadrátti munandi.

## FAKTA

Talið á fráboðaðum kikhostatilburðum higartil í ár er 11. Í 2005 vóru tríggir tilburðir fráboðaðir.

Í seks førum var smittukeldan ókend. Hjá trimum var hon eitt systkin, hjá einum helst foreldur og hjá einum annað barn við kikhosta.

Fimm av fráboðaðu tilburðunum vóru í Tórshavnar kommunu, hinir seks vóru staðfestir í Porkeri, Rituvík, Fuglafirði, Sandavági, Miðvági og Sørvági.

## Pop Top konsertin 27.

Pop Top konsertin hevur verið lopfjølin hjá fleiri føroyskum bólkum og tónleikarum, ið nú teljast millum teir fremstu á tónleikapallinum. Konsertin, ið seinastu nógvu árini hevur búleikast í Grasagarði, er skipað sum ein kapping, har vinnarin sleppur at luttaka á Ólavsøkukonsertini.

Ofta hevur spenningurin millum ungu tónleikararnir verið stórur, men neyvan nakrantíð størri enn í ár, tí í ár er konsertin 27. juli, ella við øðrum orðum sama dag sum Ólavsøkukonsertin. Hetta merkir í royndog veru, at ein ungur bólkur skal beina leið av pallinum í Grasagarði niðan á risa stóra pallin í Kommunuskúlagarðinum har hann skal framføra ígjøgnum eitt ljóðannlegg, sum telist millum tey størstu í landinum.

Í ólavsøkuskránni er dagfestingin komin skeivt fyri, soleiðis at prentað stendur, at bólkarnir spæla Ólavsøkuaftan, men hetta er ikki so, rætta dagfestingin er 27.juli kl. 14-17.

**nud**

## Lampshade í Café Natúr í kvøld

Nú verður høvið at uppliva ein av bólkunum, ið ikki fekk framført á G!Festivalinum vegna mjørka í Vágunum. Bæði Sundiver og Lampshade gliðu út av skránni, men í kvøld verður høvið at hoyra svensk/danska bólkin Lampshade í Café Natúr.

Lampshade hevur í fleiri ár havt nógvar fjepparar í Føroyum og talið er vaksandi. Talan hevur í fleiri førum verið um at fáa bólkin henda veg. Lampshade eru á konsertferð kring Evropa nú tey koma til Føroya at spæla.

Bólkurin hevur fingið ómetaliga góð ummæli kring heimin, m.a. hevur kanska mest virda tónleikaritið í heiminum Rolling Stones givið bólkinum 4 av 5 stjørnum. Konsertin hjá Lampshade á SPOT-festivalinum fekk 5 stjørnur í Gaffa.

Yndisliga og karismatiska svenska songkvinnan, Rebekkamaria, hevur skrivað flestu sangirnar á nýggju á nýggju fløguni, sum er ein meistarlig blanding av svenskum poppi, stórslignum norðurlendskum larmirokki og vøkrum singer/songwriter stíli. Ljóðið ferðast frá ljósum og innbjóðandi melodium til rytmiskt grundaðan popp til stórar larm spreingingar. Heitið "Let's Away" er tikið frá Shakespeare og boðar frá dýpi, ið er at finna í forteljandi tekstunum hjá Lampshade, sum bæði eru á enskum, svenskum og donskum.

**nud**

# Vinningur í juli

**Familjupakki til Summarfestivalin:**

- 2 atgongumerki til vaksin
- 2 atgongumerki til børn
- Gávukort á kr. 1.000,-

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 3. august kl. 10.00 og merkið bjálvan »Sudoku«.

Drigið verður fyrstu vikuna í august.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar vera loystar.




# SUDOKU

## JULI KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | | | | 5 | 4 | 1 | | |
| 8 | | 6 | 2 | | | | | 3 |
| | 1 | | | | 3 | 7 | 9 | |
| 6 | 5 | | | 7 | 9 | | 1 | |
| | 4 | | | | | | 3 | |
| | 2 | | 8 | 4 | | | 5 | 7 |
| | 7 | 2 | 1 | | | | 6 | |
| 3 | | | | | 6 | 4 | | 1 |
| | | 9 | 4 | 2 | | | | 8 |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | 9 | | | 5 | | | |
| | 6 | 8 | | | | | | |
| 5 | | | 7 | | 2 | | | 8 |
| | | | | 4 | 8 | | 5 | |
| | 5 | 6 | 1 | | 3 | 4 | 7 | |
| | 9 | | 2 | 5 | | | | |
| 3 | | | 4 | | 9 | | | 6 |
| | | | | | | 8 | 9 | |
| | | | 8 | | | 1 | | 7 |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 5 | | 8 | | 9 | | | |
| 2 | | 7 | | | | | | |
| 1 | 9 | | | 3 | | | | 4 |
| 5 | | 1 | | 7 | | | | |
| | | | 1 | | 8 | | | |
| | | | | 6 | | 4 | | 9 |
| 8 | | | | 4 | | | 5 | 7 |
| | | | | | | 9 | | 1 |
| | | | 7 | | 3 | | 2 | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 6 | | 5 | 7 | 4 | | | 2 |
| | | 4 | | | | | 7 | |
| | | 1 | 9 | | | | 3 | |
| 6 | | | | | 3 | | | |
| | 4 | | | | | | 2 | |
| | | | 1 | | | | | 7 |
| | 3 | | | | 8 | 1 | | |
| | | 9 | | | | 8 | | |
| 7 | | | 4 | 9 | 6 | | 5 | |

TRUPUL

NAVN: ____________________ BÚSTAÐUR: ____________________

TELEFON: ____________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin